## Loftbrúgv til Skotlands

Mongu skotsku ferðafólkini seta eisini síni krøv til loftvegis flutningin. Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways er eisini skjótur av viðganga, at tey hava havt úr at gera hesa vikuna. Mánadagin komu trý flogfør úr Skotlandi. Í dag eru tey tvey í tali og í morgin koma aftur trý flogfør við ferðafólkum. Mikukvøldið er fyrsta fráferðin aftur til Skotlands, og síðani verður luftbrúgvin hildin við líka, til seinastu ferðafólkini eru flogin heim fríggjadagin.



## Naismith vil til Rangers

Tað tóktist vera eydnan, tá ungi Steven Naismith eftir eitt flott kappingarár skuldi seljast frá Kilmarnock til Glasgow Rangers fyri £450.000. Nú sigur spælarin, sum í evstu løtu varð tikin í hópin til Føroya-ferðina, at hann óttast eitt summar, har hann ikki veit, hvørt hann er keyptur ella seldur. Kilmarnock er nevnliga als ikki áhugað í at selja áleyparan, sum helst vil hava framtíðina greidda, áðrenn hann fer í summarfrí eftir landsdystin mikukvøldið.

Hjálparvenjari hjá Skotlandi:

# Føroyar vaktu undran móti Italia

**Andy Watson, hjálparvenjari hjá Skotlandi, sá dystin á Tórsvølli leygardagin, og var ikki sørt imponeraður av føroyska liðnum. - Vinna vit 1-0 á Toftum, so skulu vit vera sera fegnir, sigur hann**

LANDSDYSTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Millum teir 5.987 áskoðararnar á Tórsvølli leygardagin, vóru eisini umboð fyri skotska landsliðið. Teir sóu eitt føroyskt lið, sum legði eitt tað besta avrikið eftir seg nakrantíð. Og tað vakti undran millum týdningarmiklu menninar úr Skotlandi.

Andy Watson er ein av hjálparvenjarunum hjá Alex McLeish, landsliðsvenjara. Hann var á Tórsvølli og hugdi at dystinum. Vit hava tosað við skotskan journalist frá Daily Record, sum eftir dystin hevur havt samband við Andy Watson, og hesin visti at siga, at hjálparvenjarin var ovfarin av føroyska spælinum.



*Skotski hjálparvenjarin var imponeraður av tí, sum føroyska liðið vísti móti Italia*

*Mynd: Polfoto/AP*

- Føroyska liðið spældi ein framúr góðan dyst, og við tí avrikinum, teir vístu leygardagin, skulu vit vera sera fegnir við at vinna 1-0, hevur Andy Watson sagt.

Hann rósti liðavrikinum frá føroyingum, sum hann helt vera framúr gott, men nevndi síðani Rógva Jacobsen, sum hann helt vera serstakliga góðan.

- Rógvi Jacobsen er ein sera góður spælari, sigur Andy Watson, og nevndi hann sum ein leikara, ið skotska verjan eigur at ansa sera væl eftir.

Skotski hjálparvenjarin nevndi eisini vøllin á Svangaskarði, sum hann ikki metir skal vera nakar trupulleiki

- Tað ein góður vøllur, sum er smalur og tað eingin trupulleiki hjá okkum, hevur hann sagt.

Hetta er tað beint øvugta av tí, sum Berti Vogts, táverandi landsliðsvenjari, segði í 2002. Hann fanst hvassliga at vøllinum, men nú sær út til, at skotar ætla at venda fokus á sjálvan dystin, og ikki kringumstøðurnar annars, sum ikki kunnu broytast í eini handavending kortini.

# Landsliðið var málið

**Undir drúgva skaðasteðginum var eitt av høvuðsmálunum hjá Jón Róa Jacobsen, at hann aftur skuldi spæla landsdyst fyri Føroyar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin móti heimsmeistarunum var ein stór uppliving hjá føroysku spælarunum. Hjá Jón Róa mundi løtan tó kennast eyka stór, tí hetta var fyrsta ferðin í hálvtannað ár, at hann aftur spældi á landsliðnum.

- Ta tíðina, sum eg var skaddur, hevur tað alla tíðina verið eitt av mínum málum at sleppa aftur á landsliðið. Og tí var hetta ein deilig uppliving. At tað so skuldi verða móti Italia gjørdi bara løtuna eyka góða.

Nú er dystur aftur longu mikudagin. Eru fýra dagar nóg long tíð til at løða batteríini aftur?

- Tað haldi eg. Tað er jú fleiri ferðir í heimligu kappingini, at vit spæla sunnu- og mikudag, so tað eiga vit at klára. So fer tíðin at vísa, um eg sleppi at spæla aftur hesaferð.

Júst plássið hjá Jón Róa í miðverjuni er eitt av teimum, sum verður nevnt, tá rúm skal finnast fyri Fróða Benjaminsen. Men hetta er ein spurningur, sum spælarin sjálvur ikki vil nerta.

- Tit siga í øllum førum, at Fróði skal inn onkra staðni – og møguliga í miðverjuna. Men tað verður so Jógvan Martin, sum ger av, hvørjir spælarar spæla hvar, og tað hava vit sjálvandi eisini virðing fyri, sigur Jón Rói.

*Ætlanin hjá Jón Róa var, at hann skuldi verða tøkur hjá landsliðnum í vár, men tá tað ikki gekk, so var tað væl eisini í lagi at byrja við heimadysti móti heimsmeistarunum, heldur hann*



# Rógvi hóttir metið



*Rógvi Jacobsen hevur nú bert eitt mál eftir, áðrenn hann er ájavnur Toda Jónsson á føroyska alltime-listanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Føroyar hava fingið tvey landsliðsmál í ár, og í báðum førum hevur málskjúttin verið tann sami**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá ið Rógvi Jacobsen leygarkvøldið við krúllinum sendi bóltin inn um Buffon í italska málinum var tað áttanda ferðin, at Rógvi skoraði fyri Føroyar. Eftir dystin segði toppskjúttin seg ikki hugsa so nógv um, at hann nú er rættuliga tætt við at gerast føroyskur toppskjútti í landsliðsfótbólti. Heldur helt málskjúttin, at tað snýr seg um, at Føroyar fáa mál og vinna.

Sjálvandi skal Rógvi siga soleiðis. Men millum fótbóltsáhugað og ikki minst millum spælararnar verður tað gingið høgt upp í hagtøl av hesum slagnum.

Í fjør fingu Føroyar einki landsliðsmál. Í ár er talið komið upp á tvey. Fyrra málið varð skorað 28. mars, tá ið Føroyar á útivølli taptu 3-1 ímóti Georgia. Eisini ta ferðina var Rógvi Jacobsen málskjútti. Tað málið var tað fyrsta, sum Føroyar fingu aftaná, at Símun Samuelsen við rimmar skoti úr sera spíksum í høgru í yvirtíðini 8. oktober 2005 skoraði á útivølli ímóti Ísrael, sum vann 2-1..

Áttanda málið hjá Rógva bar við sær, at hann legði seg við síðuna av Una Arge á toppskjúttaralistanum. Todi Jónsson er framvegis føroyskur toppskjútti í landsliðsfótbólti. Hann skoraði 9 mál í 45 landsdystum. Uni Arge skoraði 8 mál í 37 landsdystum.

Í annaðkvøld fer Rógvi Jacobsen at umboða Føroyar fyri 44. ferð. Rógvi hevur seinastu árini verið nógv tann vandamiklasti føroyski málskjúttin.

Føroyar hava í 112 landsdystum skorað 72 mál. Fremstu málskjúttarnir eru Todi Jónsson (9), Uni Arge (8), Rógvi Jacobsen (8), John Petersen (6), Julian Johnsson (4), Jan Allan Müller (4), Jens Kristian Hansen (3) og Kurt Mørkøre (3).

Átta spælarar hava skorað tvey mál: Fróði Benjaminsen, Jákup á Borg, Øssur Hansen, Christian Høgni Jacobsen, Henning Jarnskor, Torkil Nielsen, Jens Erik Rasmussen og Kári Reynheim.